# Úr Løg-tinginum



## Sjey fyrstu viðgerðir undir einum

*Á skránni fyri tingfundin í gjár vóru sjey fyrstu viðgerðir. Tær vórðu allar viðgjørdar undir einum*

JOHN JOHANNESSEN

Dagsskráin fyri tingfundin í gjár taldi heili nýggju punkt. Men í veruleikanum vóru kortini ikki meira tvey mál á skránni umframt framløgur.

Á dagsskránni vóru nevniliga ein triðja viðgerð, sjey fyrstu viðgerðir og framløga. Men av tí, at allar tær sjey fyrstu viðgerðirnar snúu seg um sama mál og tískil vórðu viðgjørdar undir einum, var talan bert um eina triðju viðgerð, eina fyrstu viðgerð og framløgu.

Málið, sum var til fyrstu viðgerðar, var tingmál nummar 46/1999, ið er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. Hetta málið legði Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, fyri tingið 25. januar.

Tær sjey fyrstu viðgerðirnar, sum vórðu viðgjørdar undir einum, vóru av ávikavist tingmáli nummar 29/1999, 30/1999, 32/1999, 33/1999, 34/1999 og 48/1999.

Tingmál nummar 29/1999 er uppskot til løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt.

Tingmál nummar 30/1999 er uppskot til løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um býtið av almannaútreiðslum við meira.

Tingmál nummar 31/1999 er uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg.

Tingmál nummar 32/1999 er uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um barnaforsorg.

Tingmál nummar 33/1999 er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimasjúkrasystratænastuna.

Tingmál nummar 34/1999 er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heilsusystratænastuna.

Seinasta tingmálið í røðini av teimum, ið vóru til fyrstu viðgerðar, var tingmál nummar 48, sum er uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.

Øll tingmálini, ið vóru til fyrstu viðgerðar, hevði Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í Almanna- og Heilsumálum lagt fyri tingið.

Áðrenn tingfundurin var lokin, var framløga á skránni.

## Privatisering av dagsskránni

*Uppskotið hjá Sambandsflokkinum um privatisering av almennum partafeløgum varð tikið av skránni á fyri tingfundin hósdagin*

JOHN JOHANNESSEN

8. februar, legði Edmund Joensen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram uppskot til samtykar um, at privatisering av almennum partafeløgum. Hetta uppskotið skuldi koma til fyrstu viðgerðar á tingfundinum hósdagin, men varð tað tikið av dagsskránni.

Sambandsflokkurin heitir í uppskotinum á landsstýrið um at leggja løgtingslógaruppskot fyri tingið av alemmnum partafeløgum, og nevnir flokkurin fyrst og fremst Føroya Banka og Føroya Tele.

Flokkurin sigur í viðmerkingunum til uppskotið, at onnur feløg eisini kunnu koma við í ætlanina, men at talan skal vera um eina varisliga privatisering.

Sambandsflokkurin sigur, at hann allatíðina hevur hildið, at so skjótt ringasta kreppan var av, átti at verið farið undir eina sokallaða normalisering av eigaraviðurskiftunum í Føroya Banka. Somuleiðis vísir hann á, at ætlanin um at gera stovnar til partafeløg bara var fyrsta stigið á leiðini, áðrenn farið varð undir at privatisera.



*Sum støðan er nú, hevur SVF ikki gjaldføri at gjalda rokningina upp á 1,2 mió. kr. uttan so, at aðrir ognarar mugu bíða við at fáa sín pening, skriva Rasmussen & Weihe í hesum partinum av frágreiðingini um Sjónvarpið*

# Roknskapurin í SVF skeivt endurgivin á fíggjarlógini

*– Vit vilja ikki leggja okkum út í, um íløgan til bygningin átti at verð skerd, men vit staðfesta, at um grundgevingin fyri skerjingini var avlopið, sum roknskapurin hjá SVF vísti á fíggjarlógini, so varð hon gjørd út frá skeivum fortreytum, sigur Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe um nýggja bygningin hjá Sjónvarpinum*

ÓLAVUR Í BEITI

Í partinum »Íløgan í nýggja bygningin« stendur í frágreiðingini hjá Rasmussen & Weihe, at upprunaliga metingin var, at samlaða byggingin fór at kosta 11,5 mió. krónur. Haraftrat kom 1 mió. krónur til neyðstreymsaggregat sum partur av eini almennari tilbúgvingarskipan. Seinni varð bygningurin mettur at kosta 11,9 mió. kr., men endaliga upphæddin gjørdist 12,1 mió. krónur.

Rasmussen&Weihe hava so sett sambandið millum kostnaðin av samlaðu bygginingini upp ímóti fíggjarlógini, upprunaligu játtanini og endaligu játtanini, og siga at fíggjarlógarjáttanin til neyðstreymsaggregat er, hóast hon varð strikað í 1998, tikin við aftur í 1999.

– Um ætlanin við broyttu fíggjarlógarjáttanini var, at SVF skal gjalda hesa upphædd yvir sín egna rakstur, átti hon at verið við í rakstrinum fyri 1998, har hon hoyrir heima. Hetta merkir í stuttum, at úrslitið í 1998 var 1,2 mió. kr. verri enn ársroknskapurin hjá SVF vísti, siga Rasmussen & Weihe.

### Vánaligt samskifti

Um orsøkina til, at fíggjarlógarjáttanin (byggijáttanin) uppá 11,9 mió. lækkar undir teirri endaligu viðgerðini til 10,9 mió., siga Rasmussen & Weihe, at hon er óivað, at roknskapurin hjá SVF í fíggjarlógaruppskotinum vísir eitt rakstraravlop uppá 2,6 mió. kr.

– SVF hevur í hesum sambandi víst á, at roknskapurin er skeivt endurgivin á fíggjarlógini, og at SVF hin 26. august 1997 sendi skjøl til fíggjarfulltrúan í Mentamála- og Undirvísingarstýrinum, har greitt var frá skeivleikanum. Tað er okkara fatan, at samskiftið, sum hevur verið millum Mentamála- og Undirvísingarstýrið og SVF í hesum máli, hevur ikki verið so gott, sum tað átti, siga Rasmussen & Weihe.

### Roknsingin skal gjaldast

Og víðari verður sagt, at vit skulu ikki við hesum leggja okkum út í, um íløgan til bygningin átti at skerjast, men vit staðfesta, at um grundgevingin fyri skerjingini var avlopið, sum roknskapurin hjá SVF vísti á fíggjarlógini, so varð hon gjørd út frá skeivum fortreytum.

– Tað er givið, at um so er at byggingin varð steðgað, orsakað av at skarvað var av játtanini, so hevði hetta havt avleiðingar fyri framtíðar nýtsluna av tí sum longu var bygt, samstundis sum hetta óivað eisini hevði havt avleiðingar fyri samskifti/kontraktviðurskiftini millum teir sum gjørdu arbeiðið og byggiharran.

– SVF hevur ikki tikið rokningina uppá tær 1,2 mió. kr. við í roknskapin fyri 1998 og harnæst hevur SVF ikki goldið rokningina enn. Orsøkin til hetta skal partvís síggjast út frá tí, at SVF hevur roknað við, at tá játtanarmyndugleikin sá, at skerjing varð gjørd út frá skeivum fortreytum, so fór upphæddin at verða játtað av nýggjum.

– Upphæddin hevur soleiðis hvørki havt rakstrarella gjaldførisávirkan enn, men rokningin skal gjaldast, og tá fer upphæddin at hava gjaldførisávirkan. Sum støðan er nú, hevur SVF ikki gjaldføri at gjalda rokningina uttan so at aðrir ognarar mugu bíða við at fáa sín pening, skriva Rasmussen & Weihe í hesum partinum av frágreiðingini um Sjónvarpið.

# Markið fyri avskrivingum verið hækkað munandi

Tøkniliga gongdin ger, at virkir í dag sjálvdan rokna rakstrargøgn, ið hava eitt virði á 4.000 kr, sum eina íløgu, men heldur sum eina vanliga rakstrarútreiðslu, skrivar Vinnuhúsið

Løgtingið samtykti í farnu viku eitt uppskot frá landsstýrinum um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v. m. Í vavi er ikki talan um stóra broyting, men talan er um eina broyting, ið ger tað umsitingarliga nógv lættari hjá vinnuni, og hetta er at frøðast um.

Í grein 3 í løgtingslóg nr. 52 frá 29/12 1971 um avskrivingar, varð ásett, at útveganarpeningur upp til 4.000 kr kann verða drigin frá skattskyldugu inntøkuni ta inntøkuár, sum nýútveganin fer fram. Lógarbroytingin merkir, at nevnda mark á 4.000 kr fyri avskriving av smáognum verður upp í 20.000 kr.

### Ikki regulerað

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur fleri ferðir gjørt myndugleikarnar varar við, at í Føroyum hevur upphæddin ikki verið regulerað, meðan hon í Danmark verður regulerað árliga.

Felagið hevur víst á, at fyri at minka um fyrisitingarligu byrðurnar hjá virkjunum og hjá almennu umsitingini, átti markið fyri avskrivingum at verið hækkað munandi.

Tøkniliga gongdin ger, at virkir í dag sjálvdan rokna rakstrargøgn, ið hava eitt virði á 4.000 kr, sum eina íløgu, men heldur sum eina vanliga rakstrarútreiðslu.



# Ávirkan løgmans skal gerast greið

*Helena Dam á Neystabø skal mikudagin svara munnligum fyrispurningi frá Kristiani Magnussen, um hvørja ávirkan hóttanarbræv frá løgmanni hevði á uppsøgnina av fyrrverandi sjúkrahúsleiðaranum*



*Kristian Magnussen, løgtingsmaður spyr Helenu Dam á Neystabø*

JOHN JOHANNESSEN

– Hvørja ávirkan hevði brævið frá løgmanni á uppsøgnina av Jákupi Mørkøre, fyrrverandi sjúkrahúsleiðara?

Soleiðis ljóðar munnligi fyrispurningurin frá Kristiani Magnussen, løgtingsmanni, sum Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum, skal svara á tingfundinum mikudagin, tá fráboðaðir fyrispurningar eru á dagsskránni.

Kristian Magnussen vísir á, at nakað efir, at Jákup Mørkøre varð sagdur úr starvinum sum leiðari á Landssjúkrahúsinum kom fram, at Helena Dam á Neystabø frammanundan uppsøgnina hevði fingið bræv frá løgmanni, har hann gjørdi henni greitt, at gjørdi hon ikki bart á Landssjúkrahúsinum, fór løgmaður sjálvur at taka neyðug stig í hesum máli.

Hvørjum tiltøkum, løgmaður hóttir landsstýriskvinnuna við, heldur Kristian Magnussen ikki vera trupult at ímynda sær. Hann vísir á, at uppgáva løgmans sambært grein 33, stk. 3 í stýrisskipanarlógini er at hava eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.

Í brævinum til Helenu Dam á Neystabø segði løgmaður soleiðis: »Løgmaður er gjøgnum fjølmiðlarnar vorðin kunnaður um ætlaðar hópuppsagnir á Landssjúkrahúsinum. Talan er um stórt og álvarsligt mál, sum løgmaður av tygum ikki er vorðin kunnaður um.

At tílík stórmál verða borin fram í fjølmiðlunum, uttan at løgmaður er vorðin kunnaður, og uttan at málið er viðgjørt á landsstýrisfundi, er ikki nøktandi. Løgmaður kann als ikki góðtaka hesa framferð.

Er orsøkin til hetta vánaliga arbeiðslag tann, at embætisførslan í fyrisiting tyggara ikki hevur verið nøktandi, eigur hetta at fáa avleiðingar. Um so er, at greiða ikki fæst á hesum alt fyri eitt, fer løgmaður sjálvur at taka neyðug stig í hesum máli.«

# Tórbjørn spyr um usiting av tunfiskaloyvum

*Jørgen Niclasen skal mikudagin millum annað svara Tórbirni Jacobsen undir hvørjum treytum tunfiskaloyvi verða latin og um ymiskar treytir eru settar ymisku loyvishavarunum*

JOHN JOHANNESSEN

Jørgen Niclassen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, skal mikudagin svara fráboðaðum munnligum spurnigi frá Tórbirni Jacobsen, tingmanni, um umsiting fiskimálastýrisins av tunfiksloyvum.

Fyrispurningurin er settur saman av fimm spurningum, og spyr Tórbjørn Jacobsen:

– Hvussu nógv tunfiskaloyvi eru givin. Nær og til hvønn?

– Undir hvørjum treytum eru tunfiskaloyvini latin? Og um ymsar treytir eru settar loyvishavarunum, verður biðið um eina nærri grundgeving fyri hesum.

– Í hvønn mun hevur Fiskimálastýrið tryggjað sær, at loyvishavararnir sjávir eru mentir at gagnnýta hesi loyvi?

– Um loyvishavararnir ikki hava førleika til sjálvir at gagnnýta hesi loyvi, hvørji tiltøk hevur — ella ætlar — Fiskimálastýrið at seta í verk til tess at tryggja almenn áhugamál í hesum sambandi?

– Hvussu ætlar Fiskimálastýrið at umsita slík loyvi í framtíðini? Er ætlanin at broyta mannagongd, verður biðið um eina frágreiðing um ætlaðu broytingarnar og við hvørjari grundgeving hesar verða settar í verk.

Herfyri kom fram, at tað ber til at vinna pening burturúr at eiga tunfiskaloyvi, hóast tú ikki eigur skip, við at leiga tunfiskaloyvið út.



# Tróndur fekk skaða av súgi

*Strandfaraskipið, Tróndur, mátti gjaramorgunin takast úr sigling, orsakað av einum skaða skipið fekk av nógvum súgi í Havini í Skopum*

JOHN JOHANNESSEN

Týsmorgunin mátti strandfaraskipið, Tóndur, umvælast á Tórshavnar Skipasmiðju, eftir ein lítlan skaða, hann fekk av nógvum súgi í Havnini í Skopun.

Talan var ikki um nakran stóran skaða, og um middagsleitið kundi Tróndur aftur sigla um Skopunarfjørð við fólki og farmi.

Tað, sum hendi við Tróndi var, at ein kantur á gronini, sum skipið brúkar at hefta seg í ferjuleguna við, brotnaði, tá skipið í nógva súginum arbeiddi so hart móti ferjuleguni í Skopun.

Sambært teknisku deild hjá SL kundi skaðin sveisast aftur í Skopun, men av tí at einki hóskandi tilfar var at finna í Sandoynni, mátti skipið sigla til Havnar at verða umvælt.

Leiðin um Vestmannasund var eisini darvað eitt sindur gjáramorgunin, men her var súgur í sjónum ikki orsøkin, hóast tað fréttist úr Vágum, at nógvur súgur eisini var í Vestmannasundi av vesturættini í gjár.

Tað, sum darvaði Vesturleiðini gjáramorgunin var, at ein oljutrýstslanga í ferjuleguni á Oyragjógv var farin. Brekið varð skjótt umvælt, og tí gjørdist leiðin um Vestmannsund eisini reglulig fyri middag í gjár.


